


## Hár fyri lívið!

So havi eg aftur kós móti Føroyum við nýggjum, alternativum hári, ið tolir vask:

'Hár fyri lívið' er eitt nýtt og kollveltandi slag av hári, ið kann nýtast av kvinnum og monnum í øllum aldri. Her er einki minni enn avloysarin fyri toupeir og parykkar!

Hárparturin verður settur fastur í húðina í 4 vikur í senn við einum kremi, ið verður smurt á høvdið. Hárið situr fast alt tíðarskeiðið og skal bert hava dagliga røkt, eins og vanligt hár. 'Hár fyri lívið' er framleitt av ektaðum hári, við einum serstakliga tunnum botni. Fyrimunirnir eru fleiri; umframt at tað kennist sum títt egna hár, gevur tað møguleika fyri at velja frisuru, sum tær lystir; hárið kann vaskast og brúsast so ofta tær lystir og í mun til undanfarin sløg av hári, eru eingir kantar, sum síggjast og skulu goymast.

Hárslagið verður selt sum ein skipan og umframt mánaðarligu tænastuna, er útskifting av hárpartinum uml. 4. hvønn mánaða íroknað. Soleiðis tryggjar tú tær, at hárið altíð er sum tað eigur at vera og ikki nær at verða slitið, áðrenn næsti hárparturin er klárur.

Ring til mín og lat okkum avtala eina tíð, har tú kanst hoyra nærri um nýggju hárskipanina...

*Vinarliga*
*Henning Toftild (fart. +45 40 50 32 11)*

**HOTEL HAFNIA (Parnassið)**
Leygardagin 3. september '05
&
Sunnudagin 4. september '05
kl. 13.00 - 19.00

**SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK**
Mánadagin 5. september '05
kl. 12.00 - 16.30

**"STUTT & GREITT" Á STRONDUM**
Týsdagin 6. september '05
kl. 12.00 - 16.00

Vinarliga ring og bílegg tíð
á fart. +45 40 50 32 11



Budolfi Plads 9 · 9000 Aalborg · Tel +45 98 10 32 11

**www.parykker.dk**

## Til Sølu Opel Vectra 3,2 GTS



**Árg 04/2003 · km. 40.000**
**Til sølu um hóskandi boð fast**

**Tel 22 14 19**

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Starvsfólk til Sambýlið í Niðarugøtu 15 í Hoyvík

Innan Heimarøktina og Serforsorgina við fyribils tænastu í Sambýlinum í Niðarugøtu 15 í Hoyvík er 1 fulltíðarstarv, 40 tímar um vikuna, leyst til setan skjótast tilber, tó í seinasta lagi 1. novembur 2005.
Sambýlið í Niðarugøtu 15 er eitt sambýli fyri seinheilaskadd fólk í aldrinum 18 til 66 ár. Sambýlið er skipað undir Serstovnadeildini, sum er deild undir Heimarøktini og Serforsorgini.

Í sambýlinum koma fýra seinheilaskadd fólk at hava fastan bústað og ávísa viðgerð. Hetta eru íbúgvar hvørs virkisstøði ber dám av truplum kognitivum avleiðingum, og hjá onkrum er eisini talan um umfatandi fysisk brek. Tilboðini í gerandisdegnum verða tilrættisløgd eftir tørvinum hjá tí einstaka.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir starvsfólki, ið hevur viðkomandi pedagogiska, terapeutiska ella røktarliga útbúgving og ávísan kunnleika til økið. Umráðandi er, at umsøkjarar hava fakligan áhuga og góð samstarvsevnir. Ætlanin er at seta ein fleirfakligan starvsfólkabólk, sum í felag skal loysa allar uppgávur á sambýlinum.

**Vit bjóða**
Eitt arbeiði har tú hevur ávirkan á innihaldið í starvinum og gerandisdagin hjá búfólkinum. Eisini er møguleiki fyri at fáa tær størri kunnleika til økið og verða við til at menna stovnin. Vit eru ein fysioterapeutur og seks pedagogar, sum fegin vilja hava ein glaðan og positivn arbeiðsfelaga.
Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, so talan verður um bæði dag-, kvøld- og døgnarbeiði eins og vikuskiftisarbeiði og serstakar dagar.
Tann ið sett/ur verður, verður lønt/ur eftir galdandi sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við próvskjølum og C.V. skulu verða sambýlinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. september 2005 kl. 12.
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á sambýlinum, á tlf. 313463 ella 213363

**Sambýlið**
Niðaragøta 15
188-Hoyvík
Att: Leiðarin

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Grundstykkir á Kambsdali

Í nýggju útstykkingini á Kambsdali eru nøkur grundstykkir eftir til sølu.

Stykkini eru útgrivin og planeraði og klár at byggja á. Støddin á hvørjum stykki er uml. 550 fermetrar.

Nærri fæst at vita við at venda sær til býráðsskrivstovuna tlf. 444006

Fuglafjørður, tann 26. august 2005

**Fuglafjarðar kommuna**

## Hús í miðbýnum til leigu!

Húsini í Niels Finsensgøtu 32 eru til leigu.

Talan er um góðar 300 fermetrar í 3 hæddum umframt loft.
Hølini eru vælegnaði til íbúðir, skrivstovur og/ella annað vinnuligt virksemi.
Eigararnir ynskja at hølini helst verða leigaði út sum eitt leigumál.

Áhugaði kunnu ringja á tel 312957 ella 217366.

